# Ítrótturin 2003



**apríl:** Í manshondbólti gerst StÍF føroyameistari. Hetta hendir, tá teir í avgerandi dystinum á seinasta leikumfari vinna tryggan sigur á VÍF í Vestmanna. Alt kappingarárið hava tað verið hesi bæði liðini, sum hava dystast í oddinum, men við seinasta ósigrinum dettur VÍF á triðja plássið. Kyndil fer ístaðin avstað við silvurinum.



**apríl:** VB gerst føroyameistari í bestu føroysku kvinnudeildini. Alt kappingarárið á tamb halda tær seg heilt frammi á oddasessinum, og tá VÍF í triðseinasta umfarinum tapir fyri Stjørnuni, er leyst og liðugt hjá VB, sum veruliga kann taka sær av løttum teir báðar seinastu dystirnar.




**apríl:** Yngsti málskjúttin í føroyskum hondbólti mundi vera lítli beigg-in, sum fram-vegis var í búk-inum hjá Ioanu Rápa, tá hon skoraði seinasta málið í seinasta dystinum hjá VÍF hetta kappingarárið. 21 dagar seinni kom lítli drong-urin til verðina, tá Ioana og Daniel gjørdust foreldur á fyrsta sinni.



**apríl:** Føroyska fótbóltslandsliðið spælir tveir venjingardystir móti Kasakhstan, og í báðum førum vinna okkara menn. Á Svangaskarði er úrslitið 3-2, og ikki minst ger Jann Ingi Petersen av Toftum nógv um seg í sínum fyrsta landsdysti. Seinni dysturin, sum verður leiktur á Tórsvølli, endar við føroyskum 2-1 sigri. Ingi Højsted gerst her yngsti føroyski landsliðsleikarin nakrantíð.



**apríl:** At kalla á 39 ára degnum tekur Rógvi Johansen avgerð um at steðga við súkkling á høgum støði. Avgerðin er partvíst grundað á tvídráttin, sum hevur verið á føroyska súkklulandsliðnum og viðvíkjandi Statoil Kring Føroyar-kappingini




# Ítrótturin 2003




**mai:** Tríggir telvarar máttu út í umdyst, sum hesaferð fór fram sum snartalv, áðrenn tað enda stóð greitt, at Martin Poulsen er nýggjur føroyameistari í talvi fyri einstaklingar.



**mai:** Kvinnumanningin hjá Jarnbardi tekur lut í gig-róðrinum á Scilly. Tær detta í seinasta undanróðrinum í B-bólkin, men her vinna tær tó sannførandi sigur.



**mai:** Undan aðalfundinum hjá HSF boðar ein samlað nevnd frá, at tey nú leggja frá sær. Fyrst og fremst tykist orsøkin at vera slit. Eykaaðalfundur skal til, áðrenn nýggj nevnd er mannað.



**mai:** NM-kappingin í bridge verður fyriskipað í Føroyum.



**juni:** Føroyar missa í evstu løtu, tá Ísland í 90. minuttir skorar til 2-1 á Laugardalsvøllinum. Jákup á Borg, sum gjørdist pápi beint undan fráferðini, leggur upp til málið, sum Rógvi Jacobsen skorar. Dysturin gevur hampuliga góðar vónir undan stórdystinum móti Týsklandi.



**juni:** Fimleikaliðið hjá Høgna Øster og Helga W. Olsen, AIG, er um reppið at vinna silvur í donsku liðkappingini, men at enda mugu teir báðir føroyingar sláa seg til tols við bronsuna.